## Jákup mátti á sjúkrahúsið

Ein lítil skaði í fótinum noyddi fríggjadagin Jákup á Borg til røntgenkanningar, men talan var ikki um nakað álvarsligt. Jákup hevur av og á kent okkurt argandi í fótinum, og landsliðslæknin, sum hesa ferð var Kaj Kallsberg, vildi ikki takað nøkur óráð fyri. Tí varð Jákup til røntgen-kanningar, og har varð staðfest, at einki brot var at síggja, og so var hann til reiðar at tørna út leygardagin.



## Laudrup tosar við West Ham

Hann fekk einki starv í summar, men nú eru kortini boð eftir Michael Laudrup. Fyrst skal hann til Moskva at tosa við Spartak, og síðani gongur leiðin til London, har West Ham skal hava nýggjan venjara. Her verður tó mett, at Laudrup stendur aftan fyri italsku Gianfranco Zola og Roberto Donadoni.

# Afturval á øllum pláss

**Mett eftir avrikinum í Beograd, verður afturval yvir alla linjuna. Jónas Tór Næs er tó leikbannaður, men Jóhan Troest Davidsen prógvaði aftur hesaferð, at hann kann røkja alt í verjupartinum**




SPÆLARAUMMÆLI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

### 1. Jákup Mikkelsen, KÍ

Hóast truplar fortreytir, so hevur veteranurin og liðformaðurin mangan havt truplari dystir enn hesaferð. Uppgávurnar vóru ofta avmarkaðar til langskot og innlegg, og ta einu ferðina kom hann heilt skeivt út til eitt av innleggunum. Í aðrar mátar hevði hann tamarhald á øllum – eisini tá stútari tók í stólpan. Og sum ikki einaferð prógvaði hann virði í góðu fótbóltsbeinunum, sum bera við sær, at liðið altíð hevur eina eyka stoð at spæla seg undan trýstinum.

### 2. Jónas Tór Næs, NSÍ

Hevur eftir bara tveimum dystum prógvað, at hann er eitt sjálvsagt val í landsliðshópinum. Í verjupartinum slapp beinleiðis mótstøðumaðurin sjáldan framvið, og í avspælinum var hann munin stinnari, enn hann vísti í Portugal. Og so eru longu innkøstini eisini ein framúr dygd, sum virkar sum eyka hóttan í standastøðum frammi á vøllinum og sum ein lætti í verjuspælinum, tá trýstið skal flytast. Endaði dystin keðiligt, tá hann eitt sindur klossut fekk seinna gula kortið, men tað er eingin ivi um, at steðgurin í landsliðshøpi bert verður hendan eina dystin.

### 3. Johan Troest Davidsen, NSÍ

Eftir at hava verið miðverji og høgri bakkur seinastu dystirnar, varð Johan hesa ferð fluttur yvir á vinstra bakk, og hann prógvaði enn einaferð sítt fjølbroytni. Var saman um tikið helst tann spælarin, sum stóð sterkastur í myndini, og sæð burtur frá einari einstakari ferð, slapp beinleiðis mótstøðumaður ongan tíð at baklinjuni. Hevði við deyðbóltar ótakksomu uppgávuna at taka sær av Nemanja Vidic, men hóast onkrar hornatøkur stóðust av hesum, so varð eisini tann parturin loystur til UG.

### 4. Atli Danielsen, Frem

Á sentrala miðvøllinum var Atli partur av einum ótrúligum arbeiðsavrikið, sum fyrst og fremst bar við sær, at tað sjáldan eydnaðist serbum at spæla seg beint gjøgnum miðásina. Tvey undantøk vóru í so máta um hálva tíman, men í aðrar mátar vórðu mótstøðumenninir støðugt noyddir at venda spælinum, tá roynt varð at spæla ígjøgnum mitt fyri. Var annars sjáldan serliga sjónligur í føroyska partinum av spælinum, men tað hongur nú eisini saman við lága feilprosentinum.

### 5. Jón Rói Jacobsen, Frem

Á minus-síðuni telur sjálvandi leiðslumálið, sum hann á óhepnan hátt kom at seta inn fyri serbarnar. Men talan var so sanniliga eisni um stór pluss. Ikki minst at hann ikki í eitt einasta sekund tóktist darvaður av keðiligu hendingini. Og undirstrikaði hetta við tvær ferðir at beina vandamikil innlegg burtur inni í sjálvum málteiginum. Breyt ein heilan hóp av mótstøðuálopum við fótum og høvdi, og hevði eisini yvriskot til eitt vandamikið rykk, har hann kundi fingið møguleikan at skora í hinum endanum, men ætlaða sendingin av veinginum kom tó ongan tíð innaftur.

### 8. Mikkjal Thomassen, EB/Streymur

Átti eins og Atli sín stóru lut í æruni fyri, at serbar sjáldan sluppu avstað við kvikum smáspæli eftir miðásini. Sum stýrimaður á miðvøllinum sýndi hann framúr dygdir. Kropsstyrkin og frekleikin gera eisini, at hann er ein tann týdningarmesti føroyski spælarin, tá bólturin skal haldast í egnari røð. Eisini hóast hann einar tvær ferðir kom í vandastøðu, tá hann tók tað mest sum ov róliga undir trýsti. Var eisini avgjørdur, tá hann í tveimum førum bara langaði til, so álop endaðu við langskoti heldur enn bólttapi.

### 9. Jákup á Borg, B36

Eftir at vera á beinkinum í Portugal var Jákup nú aftur á liðnum, og hann sannførdi eisini um, at hann enn ikki verður tikin uttan víðari á kantinum. Sum altíð var arbeiðsavrikið í verjupartinum framúr, og í nøkrum førum sýndi hann eisini góðan vilja at leita í tómrúm aftan fyri verjuspælararnar, men í tveimum førum átti hann tó at roynt innleggið, heldur enn at venda spælinum. Endaði dystin sum bakkur, tá Jónas hevði fingið reytt, og eisini tann partin loysti hann væl og virðiliga.

### 10. Christian Høgni Jacobsen, AB

Var í heldur óvandu støðuni